Eyðgunn Samuelsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um mótrokning millum hjún, settur landsstýrismanninum við almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu nógvir pensjónistar hava valt at strika mótrókning millum hjún í 2020?
2. Hvussu nógv fáa hesi nú meira í fólkapensjón um mánaðin?
3. Hvussu nógv hevur hetta kostað í hægri útreiðslum til pensjón?

Viðmerkingar:
Undanfarna samgonga setti umleið 10 milliónir av á FLU fyri 2020, so verandi pensjónistar kundu velja at strika mótrokning millum hjún. Hetta varð gjørt, tí sum skipanin er sett saman, eru tað fleiri pensjónistar, kanska flest kvinnur, ið bert fingu grundupphæddina í fólkapensjón. Hetta orsakað av, at makin antin arbeiddi ella hevði eina høga pensjón við síðuna av fólkapensjónini og nýtti inntøkufrádráttin hjá hjúnafelaganum, so viðbótin ikki lækkaði. Henda skipan var góð fyri summi, men ikki fyri øll, og tí avgjørdi undanfarna samgonga at geva pensjónistum møguleika at strika mótrokningina.

Um mótrokningin varð strikað yvir ein kamb, so vildu fleiri pensjónistar mist inntøku á fleiri túsund krónur um mánaðin, og tí varð tað gjørt sum ein valskipan. Einstaki pensjónisturin kann nú velja at varðveita mótrokningina, um tað er til hennara/hansara fyrimun ella velja at strika mótrokningina, um tað er til fyrimun fyri viðkomandi.

Fyri at fáa upplýst, í hvussu stóran mun pensjónistar valdu at nýta henda møguleika og strika mótrokningina, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi 26. februar 2021

Eyðgunn Samuelsen